# 12 bólkar móti visjón 2015

**Í arbeiðinum at seta ítøkilig mál, sum skulu røkkast, nú visjón 2015 verður ítøkiliggjørd, eru 12 ymsir arbeiðsbólkar settir**

Setningurin hjá hesum bólkum verður at greina ymisk øki, soleiðis at setast kann út í kortið, júst hvørji deilmál skulu røkkast, um heildarsetningurin fyri 2015 skal røkkast.

Formenninir í ymsu bólkunum eru aðalstjórarnir í almennu umsitingini, sum soleiðis koma at hava ein týðandi samskipanarleiklut.

Arbeiðssetningurin hjá teimum ymisku bólkunum er defineraður, nú arbeiðið fer ígongd, og seinasta í hesum árinum skulu bólkarnir so handa síni álit til 13. bólkin, sum hevur samlaðu vælferðina í føroyska samfelagnum um endamál.

Teir 12 bólkarnir eru:

**Sjálvstýri**
Jóan Pauli Joensen, formaður
Jóannes Eidesgaard
Kaj Leo Johannesen
Anfinn Kallsberg
Høgni Hoydal
Jenis av Rana
Kári P. Højgaard

**Luttøka í alheimsgerðini**
Marjun Hanusardóttir, formaður
Herluf Sigvaldsson
Herálvur Joensen
Johannes Jensen
Ben Arabo
Karin Toftegaard

**Útbúgving**
Petur Petersen, formaður
Magnus Tausen
Jan Mortensen
Annika Sølvará
Katrin Apol

**Gransking, menning og nýskapan**
Petur Petersen, formaður
Bergur Poulsen
Rúna Hilduberg
Pál Weihe
Dánjal Jákup Andreasen

**Íverksetan**
Arne Poulsen, formaður
Maria Róin
Áki Johansen
Gloria Kalsø
Oddbjørg Højgaard
Regin W. Dalsgaard
Gissur Patursson

**Kunningar- og samskiftistøkni**
Arne Poulsen, formaður
Gunnar Toftegaard
Regin Ellingsgaard
Annika Mittún Jacobsen
Andras Róin
Arnold Nielsen
Ísak Jacobsen

**Samfelagsbygnaður**
Petur Alberg Lamhauge, formaður
Ingibjørg Berg
Søren Bruun
Klaus Rasmussen
Bjarni Mortensen

**Tilfeingi**
Rógvi Reinert, formaður
Regin Jacobsen
Maria Róiun
Elisabeth Ludvig
Hermann Oskarson

**Infrakervi**
Arne Poulsen, formaður
Niels Winther
Joel undir Leitinum
Finnbogi Niclasen
Olga Biskopstø
Randi Fredriksberg
Oyvindur Brimnes

**Umhvørvi**
Rúni Joensen, formaður
Dánjal Petur Højgaard
Finnbogi Joensen
Guðri Andorsdóttir
Jákup Pauli Joensen
Janet Johannesen

**Mentan**
Petur Petersen
Urd Johannsen
Andras Mortensen
Jenny Petersen
Sølvi R. Hansen
Sigvør Laksá
Dávur Winther

**Arbeiðsmarknaður**
Arne Poulsen, formaður
Maria Róin
Snorri Fjalsbak
Kári á Rógvi
Kristoffur Laksá
Páll Nielsen
Alfred Petersen




## ÁRSAÐALFUNDUR

Boðað verður við hesum til
ársaðalfund Føroya Sparikassa P/F

**fríggjadagin 10. mars 2006, kl. 17:00**
**í B36-húsinum, Gundadalur, Tórshavn**

**Dagsskrá:**
1. Frágreiðing frá nevndini um virki Sparikassans í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum
4. Heimila nevnd at lata Sparikassanum ognast egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Uppskot til viðtøkubroytingar
8. Ymiskt

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á stjórnarskrivstovuni, Yviri við Strond 2, frá 1. mars 2006.

Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

Atgongdarkort verða útflýggjað teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi mánadagin 6. mars 2006 hava biðið stjórnarskrivstovuna um hetta umvegis teldupost til:
stjornarskrivstovan@sparikassin.fo
ella á telefon 348 571 og 348 573.

Nevndin

FØROYA SPARIKASSI


# Dansifepurin komin til landið

**Nú fara dansiskeið aftur at verða boðin út**

– Kom og dansa. Soleiðis ljóðar áheitanin frá Marilyn Danielsen, dansilærara, sum í hesum døgum bjóðar út dansiskeið í Havn.

Marilyn sigur, at hon hevur fingið óteljandi fyrispurningar um at skipa fyri dansiskeiðum.

– Tíðin er nú búgvin til at endurstovna felagið ”Kom og Dansa”, sum hevur verið óvirkið í mong ár, sigur Marilyn, sum í fyrsta umfari ætlar sær at bjóða vikuskiftisskeið í Rock'n roll Swing, og til hetta endamálið hevur hon leiga seg inn í fimleikarhøllina hjá Føroya Læraraskúla.

– Um undirtøkan loyvir tí, fara vit at halda fram við ymsum grundskeiðum, millum annað í Tango, Linedans og Salsa, greiðir Marilyn frá.

### Ungdómsdansur

Umframt vikuskiftisskeiðini hevur Marilyn ætlanir um at skipa fyri dansiskeiðum fyri ungdóminum, so gentur og dreingir kunnu hugna sær saman, í einum rúsfríum umhvørvi. Í hesum sambandi ætlar hon at seta seg í samband við Losjuna í Havn at fáa í lag samstarv við tey, so gamla siðvenjan at bjóða ungdóminum at dansa í einum rúsfríum umhvørvi, kann verða tikin upp aftur í Losjuumhvørvinum.

### Barnadansur

Vit skulu nøkur ár aftur í tíðina, fyri at uppliva, at dansiskúlar við matrósaklæðum, struttskjúrtum og avdansingarveitslum, vóru ein natúrligur partur av barnalívinum.

Í besta retrostíli streyma bæði børn og vaksin til dansiskúlarnar í grannalondunum, og væntar Marilyn eisini, at vit føroyingar fara at fylgja tropp á hesum økinum. Tí hevur hon eisini ætlanir um at seta á stovn dansiskúla fyri børnum, har tey kunnu læra at dansa ein galantan vals.

### Norskur felagsskapurin

”Kom og dansa” er upprunaliga norskur dansifelagsskapur, við deildum í øllum noðurlondum. Seinast í 80'inum var ”Kom og Dansa” í Føroyum og helt dansiskeið fyri nógvum føroyingum, og var tað eisini í hesum sambandi at Marilyn tók sína dansilæraraútbúgving. Til 1992 helt hon fleiri skeið í Føroyum, har hundratals dansiglaðir føroyingar luttóku. Síðani flutti hon niður til Danmarkar, har hon eisini hevur undirvíst og lært víðari innan dansiundirvísing.

